Fylgiskjal 11

LM-016/2023

Gudrun Mortansdóttir Nolsøe

Fra: Pætur á Borg
Sendt: 14. juni 2023 13:59
Til: Gudrun Mortansdóttir Nolsøe
Emne: SV: TIL UMMÆLIS - Uppskot til broyting í revsilógin (kap 1-11)

Góðan dag

Umhvørvismálaráðið hevur ongar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Blíðar heilsur
Pætur á Borg, fulltrúi
Umhvørvismálaráðið

Fra: Gudrun Mortansdóttir Nolsøe <gudrunnolsoe@lmr.fo>
Sendt: 8. juni 2023 12:19
Til: VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>
Emne: TIL UMMÆLIS - Uppskot til broyting í revsilógin (kap 1-11)
Prioritet: Høj

Uppskot til broyting í revsilógini (Almennur partur) verður við hesum sent tykkum til ummælis.
Freistin at lata inn ummæli er mánadagin 17. juli.

Hjáheft verður uppskot til broyting av almenna partinum (kap. 1-11) í revsilógini sent tykkum til ummælis. Kapitlarnir eru um hesi evni: Innleiðandi ásetingar, vanligar treytir fyri at nýta revsirættarligu ásetingarnar, treytir fyri revsingarbari, brotsroynd og viðvirkan, revsiábyrgd fyri løgfrøðiligar persónar, revsingarnar, treytað fongsulsrevsing, samfelagstænasta, aðrar rættarfylgjur av teirri revsiverdu gerðini, at áseta revsing og uppathald av rættarfylgjum av teirri revsiverdu gerðini

Lógarteksturin er annars í høvuðsheitum umsettur til føroyskt, umframt at ávísar grundleggjandi broytingar eru gjørdar.

Av tí at tit í stóran mun hava eftirlitsstovnar undir tykkum, hevði verið gott, hóast lítlar og ongar broytingar eru gjørdar, um tit kundu hugt eftir hesum ásetingum:

- Kapittul 6: §§ 50 – 55 (sekt)
- Kapittul 9: §§ 75 – 79 (inndrátt og frádøming av rættindi)
- Kapittul 11: Fyrning

Uppskotið inniber yvirskipað hetta:

1) Broytingar í kap. 2: Vanligar treytir fyri at nýta revsirættarligu ásetingarnar
    a. Í hesum uppskotinum verður danskur revsimyndugleiki broyttur til føroyskan revsimyndugleika.
    b. Samstundis verður ein nýggj § 8 c sett inn, fyri at tryggja at tað framvegis er revsimyndugleiki fyri gerðir, sum eru framdar í øðrum pørtum av ríkinum og gerðir, sum eru framdar av ella ímóti øðrum enn ríkisborgarum, sum hava fast uppihald í øðrum pørtum av ríkinum.
    c. Eitt nýtt § 10, stk. 2 verður eisini sett inn, við somu atlitum sum § 8 c

2) Broytingar í kap. 6: Revsingarnar
    a. Nýggj lóg um revsifulnað í Føroyum (Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf) er samtykt og kemur í gildið 1. juli 2023. Hetta hevur við sær, at fleiri ásetingar í kapittul 6 verða strikaðar, tí tær eru fluttar til Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf, sum kemur í gildi 1. juli 2023.